Almennu arbeiðsplássini í Havn

Tað er so lætt at bróta niður, men sum oftast sera tungt at byggja nakað upp.

Tað er ikki eitt mál í sær sjálvum at leggja almennu arbeiðsplássini í Havn út á bygd. Fylgjurnar av hesum verða sjálvandi tær, at nógv alment sett starvsfólk í Havn verða uppsøgd og hetta er ein meiningsleysur tanki.

Vit eiga at seta prís uppá ta ekspertisu og tann loyalitet, hesi starvsfólk hava yvirfyri sínum arbeiðsplássi.

Hinvegin er tað eitt mál at gera almennu arbeiðsplássini í Havn betri og kanska meira tænastuvinarlig. Hetta vil koma ikki bert havnarfólki til góðar, men øllum føroyingum við.

Hesum vilja vit virka fyri.

Vinarligast

Bjarti Mohr, valevni hjá Fólkaflokkinum

Sambandsflokkurin er eisini liberalur í kommununalpolitikki

Liberalur merkir tað, at ein er frílyntur, og tá talan er um ein politiskan flokk, so skal tað skiljast soleiðis, at flokkurin gongur inn fyri einum frúm vinnulívi.

Sambandsflokkurin ynskir bæði í kommunalpolitikki og landspolitikki, at tað er ein skiljilinja millum kommunu-landskassan og privatkassan.

Kommunan skal ikki reka vinnulív, og tað skal tað almenna heldur ikki, tí allar royndir vísa, at hettar hepnast ikki, men tvørtur ímóti.

Árini frá miðan 70'unum og 80'unum eru ræðumyndir, sum vísa, at landskassin ikki eigur at luttaka beinleiðis í vinnulívinum. Tað eru eisini føroyskar kommunur, sum hava havt fingrarnar ov langt frammi í vinnulívinum. Hesar kommunur eru í dag so illa fyri, at tær ikki klára at greiða sínar skyldur og mugu fáa pening úr kommunala kreppulánsgrunninum, tí annars fara tær av knóranum.

Tá fører verður fram, at kommunan ikki skal reka vinnulív, so má leggjast afturat, at býráðsins uppgáva er at skapa so góðar fortreytir fyri vinnulívið sum møguligt.

Býráðið og hin einstaki borgarin, eins og vinnulívið mugu koma hvørjum øðrum nærri. Tað eigur ikki bert at vera býráðið, sum kemur við uppskotum um loysn av viðurskiftum í kommununi, men uppskot frá borgarum og vinnulívi eiga at viðgerast av býráðnum í fullum álvara, soleiðis, at býráðslimir ikki bert hitta veljarin fjórðahvørt ár, men at tað verður eitt dagligt samband, soleiðis at politikkarin veit, hvat rørist úti í samfelagnum.

Eitt slíkt samskifti við borgarin og vinnulívið nýtist ikki at viðføra, at vinnulív og privatlív verða tengd upp í býráðsarbeiðið, hetta nýtist heldur ikki at kosta pening fyri kommunukassan.

Vinarliga

Schumann Hjaltalin, býráðslimur Valevni hjá Sambandsflokkinum

Tað loysir seg at stríðast fyri barnaansing

Foreldrafelagið hevur seinastu tíðina harðliga hartað býrráðið fyri at hava gjørt ov lítið fyri barnaansingina. Og tað er rætt. Men so harðliga, sum farið verður fram, er tað mest sannlíkt, at tað verða tey, sum hava gjørt mest fyri barnaansingina, sum verða harðast rakt.

Javnaðarflokkurin kundi valt at staðið uttan fyri alla ávirkan. So vóru eingin pláss komin. Javnaðarflokkurin valdi at taka ábyrgd. Tí eru tey pláss komin, sum hóast alt eru komin. Og tað eru ikki so heilt fá, ikki færri enn 367, tá ið alt er liðugt, sum er ígongd nú, umframt 250 frítíðarpláss.

Men vøksturin hevur verið stórur. So stórur, at bíðilistin enn er umleið 400 børn.

Javnaðarflokkurin hevur nú lagt uppskot fyri býráðið, har sett verður sum mál at nøkta allan ansingartørv innan 2003. Hetta verður av nøkrum skírt sum optimistiskt. Tað er møguligt. Men tað er tá fragari at seta sær eitt mál, enn einki at seta sær. Og sum nú er, er tað gjørligt.

Tá hetta valskeiðið byrjaði, var kreppan enn ikki av, og málini, sum sett vórðu, lógu væl longri frammi enn tey, sum sett verða í dag. Tá var sett sum mál, at vit skuldu nøkta allan ansingartørv í 2006. Í dag seta vit málið til 2003. Og málið er, at tað skulu verða mennandi ansingarpláss, sum skulu bjóðast børnunum. So sigið ikki, at einki er komið burtur úr.

Javnaðarflokkurin hevur fingið alt býráðið at ganga við til at fáa barnaansing til øll. Og tað er ikki hent áður. Sjálvandi hevur foreldrafelagið eisini stríðst fyri tí. Sjálv var eg ein av teimum, sum endurstovnaðu felagið í 80'unum. So haldið tit bara áfram at stríðast. Ansið bara eftir, at tá tit sláa, at tit ikki sláa í blindum og harvið eisini sláa tykkara viðspælarar. Eg havi roynt mítt, men Javnaðarflokkurin kann ikki bara taka øll hini av ræði og kroysta sína meining yvir høvdið á teimum. Vit hava hóast alt demokrati.

Til seinast: Mín og Javnaðarfloksins hjálp skal ikki tróta. Tað vita tit. Men tað er eisini neyðugt at stríðast við skíli. Gera vit ikki tað, so seta vit okkum uttan fyri alla ávirkan. Og so er einki vunnið. Javnaðarflokkurin vil stríðast fyri 100 prosent barnaansing. Tað er avgjørt neyðugt, um Havnin skal gerast ein livandi býur.

Elin Lindenskov, býráðslimur Javnaðarflokkurin www.lindenskov.com

Forskúlaflokkar — framhald av viðmerking

Hetta er framhald av grein "Forskúlaflokkar — ein viðmerking", sum skrivað varð í sambandi við fundin hjá Foreldrafelagnum um banaansingina í Havn. Greinin endaði við at spyrja, hví ikki fleiri forskúlaflokkar eru settir á stovn.

Mítt sjónarmið er, at forskúli átti at verið eitt tilboð á øllum skúlum í kommununi — ein sjálvboðin skipan, ikki eitt krav. Vísandi til áhugan fyri forskúlanum á Sankta Frans og gongdina í øðrum Norðurlondum, hevði eg væntað, at minst helvtin av foreldrunum hevði tikið av. Fyri at tryggja góðskuna á forskúla og frítíðarskúla áttu neyðug krøv sjálvsagt at verið sett. Verandi rammur eru ikki nóg góðar, tí hevði verið neyðugt við nýløgum. Men við einum góðum vilja frá øllum pørtum — og einum lyfti um skjótar ábøtur - hevði verið møguligt at fingið forskúlaflokkar longu komandi ár, um ikki á øllum, so á flestum skúlum í kommununi. Hetta t.d. við at latið forskúlabørnini verið í frítíðarskúla um morgunin og í skúla seinnapart.

Høvdu vit fingið 6 forskúlaflokkar afturat komandi ár, so hevði tað havt ta óbeinleiðis ávirkan, at bíðilistin til dagansingina minkaði tilsvarandi, t.e. við út við 150 børnum. Eg kann tí ikki gera annað enn at mæla Foreldrafelagnum til at sýna tiltakinum ans.

Kommunan hevur ikki sovið í tímanum í hesum máli. Síðan nýggja Fólkaskúlalógin var samtykt í 1997, hava vit roynt at trýst á. Í lógini verður ásett, at kommunur kunnu seta á stovn forskúlaflokkar, men reglugerð má fyrst gerast. Eingin reglugerð er enn skrivað, hóast álit varð handað landsstýrismanninum í 1999. Tað ber tí illa til at lasta kommununi í hesum máli, vit eru rætt og slætt ikki sloppin til verka. Vónir vóru um, at vit sluppu til verka í ár — í øllum føroyskum partvís - og tí varð peningur settur av, men einki hendi.

Landsmyndugleikarnir eiga ikki at sleppa at bøla oman á málinum eitt ár afturat. Væl veit eg, at onkrir spurningar eru truplir. Eitt nú um tað skulu vera petagokar ella lærarar, ið skulu stíla fyri. Harafturat kemur spurningurin um fígging, tí sum kunnugt er tað landið, sum rindar løninrnar í fólkaskúlanum. Men eg eri vísur í, at kommunan er sinnað at boyggja seg reiðuliga langt í hesum máli, bara skipanin fæst at virka sum skjótast.

Tíverri er støðan eisini marghættlig á annan hátt. Spurnartekin kann setast við, um forskúlin á Sankta Frans verður rikin á lógligum grundarlagi. Sum kunnugt er forskúlin ein arvur frá teirri tíðini, tá ið Sankta Frans var privatskúli. Men ber í dag til at hava ein kommunalan forskúla, har børnini verða tikin inn eftir um tey hava gingið í Stella Maris barnagarðinum, um tey hava systkin á skúlanum ella um foreldrini hava verið næmingar har? Nú veit eg ikki, um hetta er raðfylgjan, ella um upptøkutreglurnar eru eitt sindur broyttar. Men eg ivist ikki í, at tey foreldur, sum høvdu kært eina avvísing, høvdu fingið viðhald í sínari kæru. Afturat hesum kemur so spurningurin um foreldragjaldið, sum mær vitandi enn verður latið fyri at hava barn sítt í forskúlanum. Nú forskúlin er vorðin partur av fólkaskúlanum, kann ein av røttum spyrja, við hvørjum rætti gjaldið verður kravt.

Mær er fortalt, at á nøkrum smærri plássum sleppa tey 5-6 ára gomlu børnini í skúla (eftir avtalu við UMMS?). Hví ber hetta so ikki til í Havn, og verður foreldragjald eisini kravt á bygd?

Klæmint Olsen býráðslimur

Vinnulívsmál

Ongin meining er í, flokkspolitiskt at staðfesta og kunngera, at vit eru fyri einum frælsum vinnulívi, um vinnulívið ikki fær røttu karmarnar at arbeiða innanfyri. Til tess at vit skulu hava eina fría vinnu í samfelagnum, so mugu vit virka fyri, at vinnulívið fær tær umstøður, neyðugar eru at virka undir.

Í Tórshavnar Kommunu merkir hetta, at vit í enn størri mun hava grundøki tøk til smærri og størri vinnufyritøkur. Og hetta skal gerast í so stóran mun, at til ber hjá kommununi ar eggja vinnuhugaðum at fara undir tiltøk undir góðum umstøðum. Fyritøkur skulu hava øki frá kommununi at seta arbeiðsumboð á; ein tørvur, sum eg persónliga leggi stóra orku í at nøkta, tí skal kommunan sum heild mennast, sum mugu bæði tær stóru og tær smáu vinnufyritøkurnar fáa betri umstøður at virka undir.

Ein stór útstykkingarætlan til vinnuøki inni á Sandvíkahjalla og aðrastaðni í kommununi er undir uppsigling og kemur í nærmastu framtíð at verða løgd fyri býráðið til samtyktar. Hetta er bara byrjanin, og tað er ógvuliga týðiligt, at størsta fortreytin fyri vinnulívsútbygging er grundøki. Men kommunan er nú vorðin so stór, at vit hava stórar møguleikar á hesum øki.

Heðin Mortensen býráðslimur og valevni til býráðið

Viðmerkingar:

Til lukku Danmark!

Tað sum hendi hósdagin í Danmark var einki minni enn eitt undur. Hóast allir teir danir, sum eru vanir við at stýra og ráða, heittu so inniliga á fólk um at greiða atkvøðu fyri at taka undir við evruni, so segði ein stórur meiriluti kortanei.

Orsøkin var tann, at fólk funnu út av, at her var ikki bert talan um pengaseðlar og veksilgjald, men um politikk. Tað evran er, er í veruleikanum ein roynd til at binda londini saman í ein felagsskap, sum tey ikki kunnu sleppa burtur úr. Harvið verður lættari at fáa londini til at ganga við til tað, sum er endamálið: at sjóða saman eitt nýtt heimsveldi, sum skal senda hermenn til at berja niður onnur lond í Afrika og Asia.

Tað var hetta, sum danir ikki vildu. Sjálvt um Nyrup og hansara harkalið eru imperialistar, so eru teir vanligu danirnir tað ikki, og nú fingu teir høvi til at gera greitt, at slíkt vildu teir ikki lata um seg ganga.

Fyri samráðingarnar um tað føroyska fullveldið var hósdagurin eisini ein vælsignaður dagur.

Tað er sera skilagott fyri okkum, tá ið vit gerast eitt sjálvstøðugt ríki, ikki at broyta tann sáttmála vit hava við Danmark um gjaldoyrasamstarv. Á henda hátt sleppa vit frá at viðgera spurningin um gjaldoyra í hesum sambandi.

Hetta var eisini tað, Ísland gjørdi, tá tað gjørdist sjálvstøðugt í 1918. Tá var ein sáttmáli millum Norðurlond um, at tey høvdu somu krónu, og Ísland gjørdist partur í hesum sáttmála. Fortreytin í hesum sáttmála var, at krónan hevði eitt fast virði í mun til gull. Tað bar tí ikki til hjá politikarnum og tjóðbankunum at hóreiggja sær sum teir vildu við krónukursini, og fólk kundu hava álit á pengavirðið.

Men hvat er hent? Av tí at londini sleptu bindingina til gullið, er pengavirði fallið. Tað sum tá fekst fyri eina gullkrónu, skulu vit í dag gjalda 29 danskar krónur fyri. Hetta hava spekulantar kunnað gjørt sær dælt av, men fyri fólk flest hevur hetta verið ein vanlukka.

Tað vísir seg, at tá politikarar sleppa at broyta virði av pengunum, so hava teir fingið eitt vald, sum teir ikki himprast við at misnýta. Hetta hava danskir politikarar gjørt, og siðvenjan í Europa er enn verri enn í Danmark.

Øll tey stóru londini har hava havt inflatión í hesi øldini, og tað er ikki so frægt, at brent barn ræðist eldin, tí tey blíva við. Tann týski markurin, sum skal eitast at vera eitt haldgott gjaldoyra, hevur mist yvir helvtina av virði sínum í mun til gull síðan hann varð settur í gildi, og evran, sum skuldi verið betri, hevur mist ein tríðing av virði sínum upp á tvey ár.

Føroyingar hava altíð verið sparsamir og dugað væl við pengum. Tað býður okkum ímóti at hava nakað við slíkar gummivalutur at gera, og tí er tað gott, at vit við dansku fólkaatkvøðuni hósdagin fingu eitt skotbrá, sum vit kunnu nýta til at finna út av, hvat ið er rætt fyri okkum at taka til ráða í hesum máli.

Tí hava vit alla orsøk til at takka tí vanliga danskarnum fyri at hann setti Nyrup og hansara harkalið upp á pláss hósdagin.

Zakarias Wang

Skotið

Eftir góð 10 ár brast aftur. Vón er nú aftur fyri einari oyggj. Vón fyri ein stóran part av øllum føroyingum. Fasta sambandið undir Vestmannasund er nú av álvara farið ígongd.

Leingi, alt ov leingi hava vit bíða. Vónandi fer arbeiði at ganga væl.

Samferðslukervið:

Men eins og hetta arbeiði nú byrjar aftur, er at ynskja, at stóran skommin í føroyska samferðslukervinum, Gásadalur, fær tað samband, aðrar bygdir hava havt í fleiri hundra ár. Eg ynski, at hetta arbeiði byrjar aftur. Sað í stóra samanhanginum, er tað arbeiði peanuts at gera, tá vit hugsa um fíggjarlógir uppá milliardir!

Eisini er neyðugt at nevna flogvøllin, ið neyðugur er at nútíðargera. Bæði vøllur og terminalur mugu gerast - og tað er ein skilagóð íløga at fremja.

Loysingarbumban má avmonterast:

Fyri at útbygging av hesum samfelag skal kunna lata seg gera, er tó neyðugt at samgongan tekur burtur ámonteraðu loysingarbumbuna frá botnventilinum á hesum samfelag. Tí um tað skotið verður sprongt, so fer alt samfelagið til botns.

Sambandsflokkurin hevur boð uppá skot í byggja hetta samfelag upprísisrættarliga.

Núverandi samgonga hevur bert eitt boð - eitt skot, ið er ein vanlukka fyri føroysku tjóðina, nevniliga loysing.

Neyðugt er at avmontera tað skaðiligu loysingarløðingina - og spreingja rætt, fyri at byggja hetta samfelag upp - eins og Sambandsflokkurin vil. Vit hava visiónirnar at byggja upp. Tað hava hinir ikki. Tað kostar at byggja upp. Tað kostar at reka hetta samfelag. Tað er ein veruleiki, ið øll mugu góðtaka.

Latið okkum byggja land!

Latið okkum løða og spreingja rætt!

Vinarliga

Marjus Dam, løgtingsmaður

Lesarabrævi:

Tillukku vágbingar

Tað var stuttligt at vera suðringur í Havn leygardagin, tá VB vann føroyameistaraheitið í fótbólti, hetta var eitt so positivt upplivilsi, at tað má vera eina tøkk verda.

Hetta at sita so nógvir suðringar saman og vera sum ein maður, tað í sjálvum sær var veldugt, og so tá málini komu og tá fór sum heitur ylur gjøgnum mannamúgvuna og øll somul lupu á føtur í senn í sigursfrøði, tað má bara upplivast. Sjálvt tann, sum lítlan áhuga hevur fyri fótbólti, verður rivin við, tá tað gongst so væl.

Sigurin var uppiborin og tað sást eisini á tí stóru mannamúgvuni, sum var komin á keiina í Havn at fagna sigursharrunum, at tey veruliga untu vágbingum henda sigu, tað vóru bara smílandi fólk at síggja og sum heilsaðu okkum, tá skipið fór frá bryggjuni.

Ferðin suður var ein stórur sigursrómur, sum vit fara at minnast leingi. Veðrið var av tí allar fagrasta, ikki ein ond, og longu tá vit komu inn um Porkerisnes sóu vit tær fyrstu rakettirnar verða sendar upp sum heilsan til meistararnar.

At vera við Smyrli hetta silvitniskvøldið inn eftir Vágsfirði var nakað, sum øll fara at minnast, øll hesi føgru ljós, sum speglaðust í tí blanka sjónum, bygdin upplýst av ymsum brennandi ljósum, ein bátur kom upplýstur við reyðum faklum ímóti okkum, og so allur riðilin av bilum sum ein perluketa inn gjøgnum bygdina, alt hetta saman gjørdi Vágs bygd veruliga til perluna í Suðuroynni hetta kvøldið.

Tá Smyril legði at minti hann mest sum flóttafólkaskipini úr Albania, sum vit hava sað myndir av, tað hingu fólk allastaðni, men hetta vóru fólk í sigursrómi, sum heilsaðu tí stóru mannfjøld, sum var komin á keiina at taka ímóti VB. Móttøkan var stórfingin, vágbingar eru jú tiknir úr leikum, tá tað kemur til slíkt, so hetta var alt óført.

Lat hetta avrikið hjá VB vera íblástur til tað unga fólkið í Suðuroynni. Hesir unglingarnir høvdu sett sær eitt mál og nú er úrslitið har. Hetta hevur kostað nógv stríð og ein ómetaligan vilja, og sjálvt við so lítlum fólkagrundarlagi vunnu teir kortini.

Einaferð enn hjartaliga tillukku VB og allir vágbingar, allir suðringar takka fyri avrikið, sum vísir at enn eru knotur í okkum.

Viberg Sørensen

Oljulond

Í hesum døgum verður almikið tosað um tann høga oljuprísin og tær óhepnu fylgjur ein høgur prísur hevur á føroyska búskapin yvirhøvur. Vert er at geva sær far um hvørji lond framleiða olju. Eg skal her geva eitt yvirlit fyri heimsframleiðsluna **per dag í Milliónum av tunnum**. **Ein tunna = 159 litrar av ráolju**, ella **crude** sum er vanliga handilsheitið fyri oljuna.

Í løtuna verða dagliga umleið **78 Mtd** nýttar globalt. OPEC er so nógv tann størsti oljuframleiðarin og setur hann eisini marknaðarprísin. Harafturat eiga OPEC londini umleið **70 %** av heimsins kendu oljureservum. Høgi oljuprísurin kemur av, at so at siga ongar goymslur eru sum kunnu tálma prísin og harnæst er vinnuvirksemi í Vesturheiminum og í Fjareystri í stórum vøkstri við støðugt økjandi oljutørvi.

Tey flestu OPEC londini hava yvirhøvur meira ella minni fulla framleiðslu. Undantikið er Saudi Arabia sum hevur møgulleikar at framleiða meira. Vert er at nevna at lond sum Iran og Irak, sum ikki eru vesturheiminum so vinarliga sinnaði allarhelst vildu minkað framleiðsluna um tey høvdu figgjarliga orku til hetta. Saudi Arabia verður nógv stuðlað av USA og er undir ávisum trýsti fyri øktari framleiðslu.

Sum kunnugt hevur USA nú latið nakað av sínum tjóðar goymslum av olju út á marknaðin. Hetta verður ikki mett at hava nakran serliga stóran týdning.

Vert er at nevna, at Vesturheimurin fær meira í avgaldi av OPEC oljuni enn OPEC londini fáa fyri sjálva oljuna. OPEC hátíðarheldur í hesum døgum 40 ára stovningardag sín í Caracas har OPEC varð stovnað 14 September 1960. Í sambandi við fundin í Caracas sigur OPEC at teir meta ikki at ov lítið av olju er á marknaðinum og at tørvurin fer at verða nøktaður framyvir.

Yvirhøvur er misnøgd við høgu prísirnar sum darvar alt kappingarførið og allarhelst verður úrslitið minni oljunýtsla og harav minkandi eftirspurningur við lægri prísum. Slíkar marknaðarregulerandi mekanismur hava vit sað áður. Verður veturin harafturímóti kaldur kunnu vit vænta sera høgar prísar.

Spennandi verður at síggja hvussu marknaðurin fer at laga seg.

Johan Mortensen

OPEC LIMALOND	IKKI OPEC LIMALOND	
Algeria 0.85	USA 7.8	Oman 9.2
Indonesia 1.30	Canada 2.6	Syria 0.6
Iran 3.70	Mexico 3.4	Yemen 0.4
Iraq 2.95	Argentina 0.9	Angola 1.3
Kuwait 2.20	Brazil 1.1	Egypt 0.8
Libya 1.45	Colombia 0.8	Congo 0.3
Nigeria 2.05	Ecuador 0.4	Australia 0.6
Quatar 0.70	Danmark 0.3	Kina 3.2
Saudi Arabia 8.60	Noreg 3.2	Indien 0.8
Sameindu Emiratuni 2.30	Stóra Bretland 2.9	Malysia 0.8
Venezuela 2.95	Rusland 6.2	Vietnam 0.3
Opec lond : 29 Mtd	**Ikki Opec lond : 48 Mtd**	

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo